# Marita Petersen er deyð



*Marita Petersen, fyrsti kvinnuligi løgmaður Føroya, fyrsta forkvinna Javnaðarfloksins, fyrsti kvinnulgi tingformaðurin og fyrsta landsstýriskvinnan í metanar- og undirvísingarmálum, andaðist sunnukvøldið 60 ára gomul*

**Sunnukvøldið andaðist Marita Petersen, fyrrverandi løgmaður, einans 60 ára gomul. Marita Petersen var løgmaður torførastu tíðina, Føroya land hevur upplivað í nýggjari tíð**

NEKROLOGUR
*John Johannessen*

Sunnukvøldið umleið klokkan 19 gav 60 ára gamla Marita Petersen, fyrrverandi løgmaður, upp andan.

Marita Petersen gjørdist í summar ólekiliga sjúk av krabba, og hevur seinastu tíðina havt stutta sjúkralegu á Landssjúkrahúsinum.

Marita Petersen hevur livað eitt ógvuliga virkið og innihaldsríkt lív. Millum annað var hon fyrsti kvinnuligi løgmaður Føroya, og var hetta í hørðu kreppuárunum tíðliga í nítiárunum.

Marita Petersen varð fødd í Vági 21. oktober 1940. Hon var dóttir Sámal Johansen úr Haldórsvík og Annu Elisabeth, fødd Matras, av Viðareiði. Maður Maritu var Kári Dalsgaard Petersen úr Sørvági.

### Virkin lærari

Hóast Marita Petersen náddi at koma ovast á politiska tindin í Føroyum sum fyrsti kvinnuligi løgmaðurin, er tað innan lærarastarvið, hon hevur havt meginpartin av sínum lívsyrki. Og hon var ein ógvuliga virkin lærari.

Í 1964 tók Marita Petersen læraraprógv á Hellerup Seminarium og fór at arbeiða sum lærari í Danmark, fyrst í Esbjerg og síðani Keypmannahavn, frá 1964 til 1967.

Marita Petersen gjørdist í 1980 cand.ped. í sálarfrøði og tók faklig og námsfrøðilig eftirútbúgvingarskeið í sambandi við arbeiðið sum lærari og sálarfrøðingur. Eisini tók Marita Petersen frá 1981 til 1982 ársskeið á Fróðskaparsetrinum í føroyskari siðsøgu og mentan.

Í 1967 flutti Marita heim aftur til Føroya, har hon fór at starvast sum lærari í Kommunuskúlanum í Havn. Her varð hon í 22 ár, til hon fór frá í 1989.

Marita Petersen hevur eisini verið lærari í sálarfrøði og í námsfrøði á Fróðskaparsetri Føroya frá 1981 til 1989 og á serlæraraútbúgvingini frá 1984 til 1986. Í 1988 og 1989 var Marita Petersen lærari í námsfrøði og námsfrøðiligum serlestri á Føroya Læraraskúla, eins og hon sama tíðarskeið undirvísti í sálarfrøði á Sjúkrasystraskúla Føroya.

1. oktober 1989 varð Marita Petersen sett í starv sum undirvísingarleiðari á Landsskúlafyrisitingini. Seinni gjørdist hon undirvísingarleiðari fyri sernámsfrøðiligu ráðgevingina, og 1. januar 1998 varð hon sett sum stjóri fyri Sernámsdepilin.

Beint fyri jól í fjør segði Marita Petersen frá sær starvið sum stjóri fyri Sernámsdepilin frá 1. januar at rokna. Og tíðliga í vár stovnaði hon sálarfrøðiliga viðgerðarstovu saman við Ásu Ellefsen.

Marita Petersen hevur havt fleiri álitisstørv í sambandi við lærarayrkið. Millum annað var hon nevndarlimur í Føroya Lærarafelag frá 1980 til 1986, harav forkvinna frá 1980 til 1984.

### Fyrsti kvinnuligi løgmaðurin

Hóast ógvuliga virkna lív Maritu innan lærarayrkið, er tað tó frá politiska leikpallinum, at flestu føroyingar kenna hana. Hóast hon bert var á hesum leikpalli í tíggju ár, eydnaðist henni at gerast fyrsti kvinnuligi løgmaður Føroya, fyrsti kvinnuligi løgtingsformaðurin, fyrsta forkvinna hjá Føroya Javnaðarflokki og fyrsta landsstýriskvinnan í undirvísingar- og mentamálum.

Marita Petersen varð vald fyrstu ferð á ting fyri Javnaðarflokkin við valið í 1988. Í 1993 valdi landsfundur Javnaðarfloksins hana til forkvinnu Javnaðarfloksins eftir Alta Dam, sum hevði átt sessin í eitt mannaminni. Marita Petersen sat sum forkvinna Javnaðarfloksins til 1996.

Fyrstu ferð, Marita Petersen kom í landsstýrið at sita, var í januar 1991, tá hon gjørdist landsstýriskvinna í mentanar- og undirvísingarmálum. Hetta starv røkti hon til januar í 1993, tá hon gjørdist fyrsti kvinnuligi løgmaður Føroya.

Og fáar dagar eftir, at Marita Petersen gjørdist løgmaður, varð hon tveitt út í álvarsamastu trupulleikarnar, nakar samgonguleiðari hevur verið úti fyri í nýggjari tíð. Føroyska samfelagið fór á húsagang, og Marita Petersen mátti taka ábyrgdina og fara ta tungu leið til Danmarkar at samráðast við donsku stjórnina um eina avtalu at bjarga samfelagnum. Hetta vóru ógvuliga harðar samráðingar, sum Marita Petersen leiddi við stórum nærlagni.

Marita Petersen fór frá sum løgmaður í september í 1994. Tá gjørdist hon løgtingsformaður, og sat í hesum sessi til juli í 1995. Marita Petersen gavst í politikki við valið í 1998.

Friður verið við minninum um Maritu Petersen, fyrsta kvinnuliga løgmann Føroya.

## Eingin avgerð við jarðarferð

JARÐARFERÐ
*Stefan í Skorini*

Enn er ikki greitt nær jarðarferðin hjá Maritu Sámalsdóttir Petersen verður. Næstringar hennara eru júst savnaðir eftir andlátið, og tí dugdu tey ikki at siga Sosialinum, nær jarðarferðin verður.

Tann eini sonurin kom í gjár, mánadagin, til Føroyar úr Kanada, har hann býr. Hann hevði ætlanir um at koma til Føroyar áðrenn deyðsfallið, men tað eydnaðist tíverri ikki.

Marita Sámalsdóttir Petersen andaðist sunnudagin. Ikki er ætlanin er bíða við jarðarferðini, og tí er hugsandi at hon verður mikudagin ella hósdagin.





Anfinn Kallsberg, løgmaður:

# Marita Petersen var nærlagdur poltikari

**Allir føroyingar eiga at drípa høvur í tøkk til hesa megnar kvinnu, sum farin er. Hon var ein nærlagdur politikari í torførastu tíðini, sum Føroyingar hava upplivað í nýggjari tíð. Soleiðis sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, um deyða Maritu Petersen**

ANDLÁT
*John Johannessen*

– Marita var ein ógvuliga nærlagdur politikari. Tað er einki at ivast í. Og hetta síggja vit eisini í hennara »lyn karrieru«. Hóast hon bert var tíggu ár í politikki, megnaði hon at gerast løgmaður, forkvinna Javnaðarfloksins og tingformaður.

– Hetta er tekin um eina virkna, men eisini virda og avhildna kvinnu í politikki, sigur Anfinn Kallsberg.

Anfinn Kallsberg vísir á, at hann persónliga hevur upplivað eitt skilagott samstarv, tá hann sat í samgongu saman við Maritu Petersen, bæði tá tey bæði vóru tingfólk, og tá Marita var løgmaður.

– Marita var løgmaður tá ógvuliga nógv stóð á, bæði hjá politisku skipanini og hjá fólkinum í Føroyum. Hetta var ein tann truplasta tíðin, vit hava havt. Og tá vóru ógvuliga nógv tung tiltøk, ið máttu setast í verk. Hetta setur sjálvandi síni spor. Men tað vísir eisini politiskt dirvi og politiskt skil, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður hevur eisini hug at vísa á, at tað var í tíðini hjá Maritu, at nógv av grundarlagnum varð lagt til stýrisskipanina, har ábyrgd og avgerð fylgjast at.

### Kendust persónliga

Anfinn Kallsberg og Marita Petersen kendust ikki bert frá tí professionella lívinum á politiska leikpallinum. Tey vóru eisini vinir og óbeinleiðis í ætt.

– Kona mín og Marita Petersen vóru syskinabørn og hava havt nógv saman, serliga fyrr í tíðina. Marita Petersen var dagligur gestur norðuri á Viðareiði í barnaheiminum hjá konu míni í sínum ungu døgum. Og harafturat eru maður Maritu, Kári Petersen, og eg eisini tríminingar. So eg havi ikki bert havt politiskt samskifti við Maritu, greiðir Anfinn Kallsberg frá.

Tí hevur Anfinn Kallsberg eisini hug at koma við einari persónligari heilsan til tey, sum hava mist.

– Tað er altíð sárt at missa. Og vil eg sýna mína djúpastu samkenslu við tær, Kára, og við tykkum, synunum, endar Anfinn Kallsberg.

Helena Dam á Neystabø:

# – Marita var djørv

**– Marita Petersen hevur ikki fingið ta viðurkenning, sum hon hevur uppiborið fyri tíðina sum løgmaður, heldur Helena Dam á Neystabø**

POLITIKARAR
*Eyðun Klakstein*



– Tað er ein skelkur at hoyra, at Marita er farin í so góðum árum, og eg havi djúpastu samkenslu við hennara avvarðandi, sigur Helena Dam á Neystabø, sum hevur arbeitt saman við Maritu Petersen sum politikari.

– Marita er ein fyrimynd fyri kvinnuligar politikarar, og hon er eitt dømi um, at tá tíðirnar eru truplast, koma kvinnur framat.

– Marita Petersen var løgmaður í eini turbulentari tíð, men hon kláraði at halda saman uppá troppuarnar í landsstýrinum. Hon hevur ikki fingið tað viðurkenning, sum hon hevur uppiborið fyri hetta arbeiðið, heldur Helena Dam á Neystabø.

### Tung uppgáva

– Marita Petersen tók eina ómetaliga tunga uppgávu á seg sum løgmaður, men hon gjørdi tað við stórum dirvið. Hon verður ofta sett identifiserað við krepputíðina, og tað er ikki rættvíst.

– Hetta var truplasta tíðarskeiðið í nýggjari føroyskari søgu, og Marita Petersen gekk undan sum ein leiðari í hesi tíð, og til tað krevst stórt dirvið, sigur Helena Dam á Neystabø.

Jógvan Sundstein:

# – Hon var góð at samstarva við

**– Stóra styrkin hjá Maritu Petersen sum politikari var, at hon var líkatil, og hon lurtaði væl eftir sjónarmiðunum hjá øðrum, sigur Jógvan Sundstein**

POLITIKARAR
*Eyðun Klakstein*



Jógvan Sundstein og Marita Petersen sótu í landsstýrinum saman, tá føroyska samfelagið fór ígjøgnum eina svára krepputíð fyrst í nítiárunum.

Marita Petersen var løgmaður, og Jógvan Sundstein var landsstýrismaður við fíggjarmálum. Tað vóru tí ikki minst tey bæði, sum myndaðu føroyskan politik í 1993 og 1994.

– Marita og eg høvdu gott samstarv – fyrst í landsstýrinum hjá Atla Dam, og síðani, tá hon gjørdist løgmaður. Hetta var ein sera trupul tíð, men vit royndu at gera tað, vit kundu, fyri koma víðari, sigur Jógvan Sundstein.

– Í 1994 segði hon Fólkaflokkin upp í landsstýrinum, og hóast vit undraðust á tað, so broytti tað einki í persónliga samstarvinum millum meg og Maritu.

Lurtaði væl

Jógvan Sundstein heldur, at stóra styrkin hjá Maritu sum politikari var, at hon var líkatil, og hon lurtaði væl eftir sjónarmiðunum hjá øðrum.

– Hon var løtt at arbeiða saman við, og hon stóð seg væl sum løgmaður, hóast tíðirnar vóru óvanliga trupular, sigur Jógvan Sundstein

– Tað kemur sum ein skelkur, at hon er farin so knappliga, og eg havi samkenslu við hennara avvarðandi. Sum skyldfólk, politikari og medmenniskja havi eg alt gott at bera Maritu, sigur Jógvan Sundstein.

Stórt úrval




-lágir prísir
og góð tilboð
Storno
Handan á 6 · 100 Tórshavn
tel 31 44 14 · fax 31 80 45